# Framkomin hoyriklinikk

**Í gjár læt upp ein forkunnug hoyriklinikk í J. C.Svabos Gøtu 12 í Havn. Klinikkin er tann fyrsta privata av sínum slag í Føroyum og eitur Hoyrnin**

HOYRN

Á Hoyrnini fer at strvast ein audiologistur, og klinikkin fer at bjóða øll tey framkomnastu hoyritólini - í alskins litum, sniðum, prísklassa og dygd. Hoyrnin fer at hava hoyritól til fólk í øllum aldri, alt eftir hvør tørvurin er, t.d. tól til fólk við niðursettari hoyrn, ella tól til fólk sum ynskja at fyribyrgja hoyriskaðum. Nýggja hoyriklinikkin fer at leggja dent á at kunna nøkta tann ymsa tørvin, fólk hava innan hetta øki, tí tað er staðfest, at rákið við hoyritrupulleikum er stórur.

Tøknin innan hoyritól er blivin sera framkomin tey seinastu árini, og tað er vorið meiri vanligt, at fólk eru farin at hugsa um, hvussu teirra hoyritól síggja út. Hoyrnin fer tí av og á at hava umboð frá ymsum fyritøkum í klinikkini og sum tann fyrsta, so kemur umboð frá Phonak í hoyriklinikkini í morgin, hósdagin 26. mars, at greiða frá tí nýggja slóðbrótandi innan hoyritól.

Umframt at bjóða hoyritól, fer Hoyrnin eisini at bjóða oyrnavernd, og er hetta nógv brúkt av eitt nú handverkarum, flogmanningum, sjófólki, motorsúkklukoyrarum og flakafólkum. Oyrnaverdini eru formstoypt, og filturini verða sett í eftir tørvi.

Av tí at hoyrievnini hjá einum eru sera týðandi, fer góðska av persónligari ráðgeving at verða í hásæti hjá nýggju hoyriklinikkini.

Hoyrnin fer at hava opið týsdag - hósdag, kl. 09-15.30, fríggjadag kl.09-14.




*Hoyrnin heldur til í hesum handilshølunum í J. C. Svabosgøtu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Savna føroyingar í altjóða farma- og frálandavinnu



*Antaris arbeiðir fyri at bøta um viðurskiftini hjá føroyskum sjófólki*

**Antares er áhugafelag hjá føroyingum í altjóða farma- og frálandavinnu, sum fæst við at bøta um viðurskifti hjá føroyskum sjófólki úti í heimi**

SJÓVINNA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Leygardagin 8. mars hevði frítíðarfelagið Antares, sum er eitt áhugafelag hjá føroyingum í altjóða farma- og frálandavinnu, ársaðalfund.

Tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali.

Stigtakarin til felagið og formaður síðan byrjan, Meinhard Jacobsen, tók ikki við afturvali. Heldur ikki Jørgen F. Andreasen tók við afturvali. Andras S. Gregersen var afturvaldur.

Nýggir limir í nevndini eru Thorvald Hansen, Hans F. Kass, Eyðun Olsen og Jónhard Petersen.

Nevndin hevur skipað seg við Thomas Lambastein sum formanni, Andras Gregersen og Eyðun Olsen, sum næstformonnum, Bjarka Fjørdal sum skrivara, Jónhard Petersen sum fíggjarleiðara, Thorvald Hansen sum sosialum samskipara. Nevndarlimir eru Martin Frederiksen og Hans F. Kass.

Síðani Felagið varð stovnað á sumri 2004, hevur felagið miðvíst arbeitt fyri áhugamálum hjá føroyingum í langfara farma- og frálandavinnu.

Felagið hevur í góðum samstarvið við Kringvarp Føroya, Føroysku Sjómanskirkjuna og Handelflådens Velfærdsråd í Danmark, betrað um tíðindaflutningin til tey skip, ið hava møguleika at móttaka teldupost.

Dagliga verður ein samandráttur av útvarpstíðindunum sendur til Handelsflådens Velfærdsråd, sum sendur tíðindini víðari, til tey skip, ið hava teknað seg til hesa tænastu. Henda tænastan er ókeypis fyri skipini. Felagið er vitandi um, at fólk eru sera fegin um hesa tænastu.

Eisini hevur felagið savnað nakað av føroyskum bókum og í samstarvið við Søfartens Bibliotek og donsku Sjómanskirkjurnar, eru hesar bøkur í dag til taks á teirra bókasøvnum í Keypmannahavn, Algeciras, Hongkong og Rotterdam.

Hesar bøkur eru gávur frá Føroya Banka, Føroya Sparikassa, Norðoya Sparikassa, Suðuroyar Sparikassa og Tryggingarfelagnum Føroyar. Skipafelagið Føroyar – nú Faroe Ship – hevur ókeypis flutt bøkurnar til Danmarkar.

Felagið hevur í dag um 100 limir, ið flest allir arbeiða hjá reiðarínum A. P. Møller – Mærsk A/S. Tó so, onkur limur er, ið starvast hjá øðrum reiðaríum.

Nevndin ger vart við, at fólk, ið starvast hjá øðrum arbeiðsgevarum enn A. P. Møller – Mærsk A/S, eisini skulu verða vælkomin í felagið.

Tekning fer fram við at venda sær til felagið á tlf. 590100, ella um teldupost aldebaran@kallnet.fo.

Meira fæst at vita við at venda sær til Felagið á www.antares.fo